# At samferðslan liggur lamin er

**– Hetta má avgjørt vera seinastu ferð, at samferðslan millum útjaðaran og meginlandið liggur lamin av afturvendandi verkføllum. Einki nútímans samfelag kann liva við hesum í 2005, og tað verður eingin, sum tímir at gera íløgur í vinnuna í útjaðaranum, um hetta óskil ikki heldur uppat, sigur Marner Lisberg, sum er nevndarformaður í P/F Sandoy Seafood, P/F Delta Seafood og sum eisini er reiðari**

VERKFØLL

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

– Hetta ber slett ikki til og er uttanfyri alt vit og skil. At vinnan í útjaðaranum næstan á hvørjum ári liggur lamin í dagar og vikur, tí eingin flutningur er um firðir og sund, er púrasta burtur við. Eingin kann arbeiða seriøst undir slíkum afturvendandi umstøðum í 2005. Hetta er ein trupulleiki, sum myndugleikar og feløg noyðast at loysa í felag, sigur Marner Lisberg, sum er nevndarformaður í P/F Sandoy Seafood og P/F Delta Seafood og sum eisini er reiðari.

Hann sigur, at tað er tokutala at tosa um íleggjarar til vinnuna í útjaðaranum, tá ið hetta eru umstøðurnar, ið samfelagið bjóðar vinnuni.

– Eingin fer at gera íløgur undir slíkum umstøðum, sum eru afturvendandi, ár undan ár. Tú kanst valla áseta ein fund, tá ið samráðingar eru millum fakfeløg, og tað byrjar at sansa at, tí tú veitst ikki, um fólk yvirhøvur sleppa til fundar.

## Ótolandi hóttanir

Marner Lisberg vísir á, at tá ið komið er undir land við onkrum av fakfeløgunum, standa tey næstu í røðini, og í flestu førum, tá ið partarnir ikki megna at loysa ósemjurnar, endar hetta við, at strandfaraskipini verða løgd.

– Tey, sum varða av hesum skipum – umborð og í landi, eru í so nógvum fakfeløgum, at tað skerst næstan ikki burtur, at siglingin verður rakt undir verkfalli.

Hann heldur, at hetta avgjørt má vera seinastu ferð, at samferðslan til og úr útjaðaranum liggur lamin.

– Hetta er í fyrsta lagi ein uppgáva, sum myndugleikarnir og fakfeløgini hava ábyrgdina av, og tí mugu tey gera nakað við at loysa hesi viðurskifti, soleiðis at hetta óskil ongantíð endurtekur seg aftur. Einki framkomið samfelag kann liva við slíkum óstabiliteti í 2005.

Marner sigur, at hann ferð eftir ferð hevur gjørt avtalu um fundir í Suðuroynni í mai mánaði, men tá ið fólk eru komin til Havnar, fáa tey at vita, at Smyril siglir ikki, tí skipið er vorðið rakt av verkfalli.

– Hetta kunnu vit ikki bjóða hvørjum øðrum í einum nútímans samfelag, leggur hann dent á.

## Øll verða rakt

Vinnulívsmaðurin spyr, hvussu vorðið hevði verið hjá fólki í miðstaðarøkinum, um Atlantic Airways fór í verkfall í dagar og vikur.

– Ja, eg kundi hugsað mær at vitað, hvussu miðstaðarøkið hevði klárað seg uttan samband við umheimin – soleiðis, sum vit, ið hava vinnu í útjaðaranum, í heilum eru avskorin





– *Undir verkføllum, har Teistin verður lagdur, verður flutningurin av fiski raktur báðar vegir, sigur Marner Lisberg*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Eingin fiskur kemur – og eingin fiskur fer

**– Vinnulívið í Sandoynni verður harðari rakt enn onnur øki, tá ið verkføll leggja siglingina hjá Teistanum lamna, sigur Marner Lisberg**

FISKIVINNA

*vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

– Tú fært ikki fisk í oynnaog tú fært heldur ikki fisk av aftur oynni. Eingin beinleiðis farmaflutningur er úr Sandoynni, og tí verður oyggin lutfalsliga harðari rakt enn eitt nú Suðuroyggin og Klaksvíkin, tá ið verkføll leggja samferðsluna lamna.

Hetta sigur Marner Lisberg, sum bæði er nevndarformaður í P/F Sandoy Seafood og P/F Delta Seafood á Tvøroyri.

## Ringast fyri

Hann vísir á, at eingin beinleiðis farmaflutningur er av Sandoynni, men bæði úr Suðuroy og Klaksvíkini sigla skip av landinum við eitt nú fiskavørum til útlandið.

– Hinvegin rakar niðurlagda siglingin hjá Strandfaraskipum Landsins eisini flutningin av ráfiski av meginøkinum til útjaðaran. Men í Sandoynni verður flutningurin sum nevnt raktur báðar vegir, sigur Marner Lisberg.

## Eingin avskiping

Hann vísir á, at verkfallið og rakta siglingin hjá Teistanum eisini hevur havt við sær, at virkini í Sandoynni ikki hava fingið avskipað fisk.

– Hvat hetta ítøkiliga hevur merkt, veit leiðslan á virkjunum báðum betur at siga, sigur Marner Lisberg, nevndarformaður og reiðari, sum heldur, at óskilið við, at samferðslan liggur lamin undir afturvendandi verkføllum, ongantíð aftur eigur at endurtaka seg.